# Granskarafundur á Havstovuni

**Í døgunum 31. august - 2. september høvdu granskarar úr Írlandi, Skotlandi, Hetlandi og Føroyum fund á Havstovuni um algueitur í skeljum**

Leo Poulsen

Granskarnir arbeiða í felag við at menna mannagongdir til kanning av algueitri í skeljadjórum og granska eisini í, hví eitrandi algur viðhvørt eru í sjónum í stórum tali. Í flestu grannalondum er skeljaaling og -fiskiskapur ein tíðandi vinna. Áðrenn skeljarnar kunnu góðkennast sum mannaføði, mugu tær kannast fyri algueitur. Skeljadjór fáa sína føði við at síla plantuæti úr sjónum. Einstakar algur gera eiturevni og tí mugu skeljadjór kannast fyri eiturevni, áðrenn tey kunnu góðkennast sum mannaføði. Sum er, eru hesar mángarnar dýrar og tíðarkrevjandi.

Tað hevur alstóran týdning fyri skeljavinnuna, at eiturkanningarnar kunnu gerast skjótt, einfalt og bíliga. Endamálið við verkætlanini er eftirkanna og vísa skeljavinnuni á nýggjar mannagongdir til at ávísa algueitur í skeljadjórum. Eisini skal verkætlanin menna forsagnir av uppblómingum av eitrandi algum.

Verkætlanin, ið hevur heitið WATER (Warning of Algal Toxin Events to support aquaculture in the northern periphery programe coastal zone Region), er fíggjað av Northern Periphery Programme, ið er leggur dent á lond, ið liggja í Norður útjaðaranum av Europa.

Havstovan er føroyskur luttakari í verkætlanini, og í stýrisbólkinum eru harumframt umboð fyri Heilsufrøðiligu starvsstovuna (matvørueftirlit) og O.C. Joensen (vinnuumboð). Verkætlanin byrjaði 1. januar 2009 og fram fram til ársenda 2011.

leo@sosialurin.fo




*Tveir sløkkiliðsbilar umframt innsatsbil er standard fyri eina útrykking*

Mynd: Álvur Haraldsen

# Útrykkningur í Hoydølum

Stutt eftir klokkan 09.30 í morgun fekk sløkkiliðið fráboðan um eld í kantinuni í Hoydølum.

Talan var allarhelst um skammlop í einari eltalvu, og sløkkiliðið fekk skjótt tamarhald á støðuni

Tað var við fullum útrykkningi, at sløkkiliðið í Havn kom á staðið uppi í Hoydølum, eftir at fráboðan um eld var komin hagani.

Løgreglan var eisini skjót á staðnum og sperraði økið av uppi við omankoyringina til Hoydalar.

Sløkkiliðið bar skjótt av og brátt var vandin av. Lítil og eingin skaði hendi annað enn at eltalvan smeltaði.

Sløkkiliðið kom við tveimum sløkkibilum umframt innsatsbili, men hetta er standard, tá rykt verður út, sigur Kartni Jacobsen, sløkkiliðsleiðari.

